


Ein stoltur Thorfloti í Istanbul, Mynd Regin Torkilsson

# Gongur væl við byggingini av Thor-flota

**Jan Müller**

09.05.2015 - 15:22

Oljan.fo

Her liggja tey trý nýggju THOR-skipini  so spelkin við kaj  í Istanbul - sum tríggir stoltir svanar.

Tað gongur væl við byggingini av teimum trimum nýggju og komandi skipunum hjá reiðaríinum Thor í Hósvík og eisini við Thor Magni, sum nú  hevur verið í drift  síðan februar. Tær meldingar, sum reiðaríið hevur fingið frá teimum, ið arbeitt verður saman við, eru, at teir eru sera væl nøgdir við skipið, skilur oljan.fo.

Næsta skipið, Thor Modi, verður klárt tann 14. mai, eftir royndir og bunkring liggur leiðin móti Europa. Enn er ov tíðliga at siga, hvar á heimshøvunum hann skal arbeiða, men tað verður so hjá onkrum av seismikkskipunum hjá PGS, ið Thor hevur gjørt langtíðaravtalu við.

Triðja skipið, Thor Frigg, verður klárt í summar og taå fjóðra, Thor Freyja, einaferð í heyst. Poul Nolsøe Laksafoss, sum hevur eftirlit við skipabyggingunum, letur væl at arbeiðinum og samstarvinum við turkisku skipasmiðjuna.